# Leiðreglur fyri liðkapping U-13 og U15+U17

## § 1 liðkapping

- Liðkappingin er skipað soleiðis, at øll lið í sama aldursbólki spæl hvør mótu øðrum minst eina ferð.
- Vinnari av liðkappingini er tað liðið ið eftir 5 umfør hevur flest stig. Stendur á jøvnum í stigum, er tað liðið ið hevur vunnið flestar dystir ið hevur vunnið kappingina. Stendur enn á jøvnum, telja innanhýsis dystir. Stendur enn á jøvnum, verður spældur ein finaludystur "Golden Set"(í HS1, HS2, DS, HD ella MD)

## § 2 Sammanseting av lið

- Eitt lið umfatar upp til 7 leikarar. Minsta mark er 3 dreingir og 1 genta.
- Bert ein drongur má verða Grandprix A-leikari tá liðið verður sett til fyrsta kappingar umfar.
- Meginreglan er, at teir leikarar ið eru komnir á eitt lið, hoyra til liðið restina av kappingarárinum.
- Um serligar umstøður gera tað neyðugt, kan liðið broytast, um hesar reglur verða hildnar:
    a) 2 leikarar sum spældi á liðinum í 1. umfari <u>skullu</u> verða við.
    b) Leikari sum verður skiftur inn, má ikki spæla í hægri GP bólk enn leikarin sum for út.

- Tað er ikki loyvt at leika á 2 liðum.
- Tað er ikki loyvt at leika í 2 ymiskum aldursbólkum.
- Um felag ikki megna at gera lið, kann BSF loyva feløgum gera felagslið.
- Um felag hevur fleira gentir enn pláss er fyri á liðinum, kann BSF loyva at ein genta spælir á einum dreingaplássi á liðinum.
  Spælur genta á dreingjaplássi, skal tað greitt viðmerkjast í tilmeldingarskjalinum og verður hetta galdandi fyri restina av *kappingarumfarið*. (hetta fyri at mótstøðulið skula hava ein reellan møguleika at vita hvørjum tey kunna rokna við at spæla ímóti, og kunna seta liðið etir tí.)

## § 3 Liðleiðari

- Hvørt lið skal hava ein vaksnan liðleiðara, ið hevur ábyrgd av liðinum, hesin verður upplýstur við tilmelding.
- Um hesin ikki sjálvur kann møta til kappingin, hevur han ábyrd av at senda ein avloysara fyri seg.
- Feløgini hava ábyrgd av at liðini eru mannaði til kappingarnar, og um ikki tað eydnast, so at geva boð til kappingarleiðslina hjá tí felagnum ið hevur kappingina.

## § 4 Lið-dysturin

- Í lið-dysti verður leikt í HS1, HS2, DS, HD og MD. (5 dystir)
- Sami leikara hevur í mesta lagi loyvi at spæla ein single og ein double/mix í hvørjum liðdysti.
- Felagið sum skipar fyri kappingini ger av, hvussu nógv skal leikast uppí, so at tíðarætlan fyri kappingina kann haldast. Útgangstøði er at spæld verða 3 set upp í 21.
- Allir 5 dystir í einum lið-dysti eiga at verða spældir
- Vunnin lið-dystur gevur 3 stig
- Taptur lið-dystur gevur 1 stig
- Lið ið ikki møtir uttan at melda avboð, fær 0 stig og verður sett at tapa 0-5 (mótstøðuliðið fær 3 stig).
- Um felag tekur lið úr kappingini, skal hetta boðast frá til kappingarnevndina beinan vegin. Kappingarnevndin ger av hvussu hetta skal ávirka kappingin, tvs um restin av dystunum verða taptir, ella spældir dystir strikaðir.

## § 5 Dommari og teljari

- Sum í øðrum kappingum døma leikarnir sjálvir.
- Hini leikarnar kunnu telja stig, men ikki blandað seg uppí dømming.
- Um ivamál taka seg upp, sum leikara ikki sjálvur megna at loysa, er tað upp til kappingarleiðslan at finna loysn.
-

## Kappingin:

- U13 møtir til hvørja liðkapping kl. 09.00
- U15+U17 møtir til hvørja liðkapping kl. 12.00
- Tey vaksnu møta til hvørja liðkapping kl. 14.00
- Kostnaðurin er 200,- fyri hvørt lið pr. umfar, og verður goldið fyriskipandi felagnum.
- Fyriskipandi felagið far allar inntøkur og ber allar útreiðslur av kappingarumfarinum, og tekur sær av øllum tí praktiska (eitt nú bóltar, kappingarleiðsla, høll, at úrslitini verða send kappingarnevndini)
- Kappingarnevndin sendir feløgunum kappingarætlan áðrenn kappingin byrjar.
- BSF útvegar heiðursmerki til nr. 1,2 og 3.

**Kappingarnevndin BSF 2011**
**(**við broyttingunum desembur 2011)